# Úr Norðdepli

**Sosialurin fær nógva vitjan millum ár og dag. Nógvar av teimum eru eisini forvitnisligar. Hósdagin var vitjan av hjúnunum Carol og Louis Hammershaimb Christiansen. Navnið bendi í sær sjálvum á samband við Føroyar, og tað hevur tað eisini**



*Havna Jógvan og synirnir Sámal og Kristian*

VITJAN
*Óli jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Louis er nevniliga abbasonur Sámal Christiansen úr Norðdepli, vanliga kallaður Sámal í Hvannasundi. Hann er saman við pápanum og beiggjanum ein partur av føroyskari fiskivinnusøgu.

Ættin gongur aftur til Havna Jógvan. Hann hevði verið nøkur ár í Kruse handlinum á Eiði, men flutti í 1879 til Norðdepil at taka við handli har.

Kona Jógvan æt Elisabeth Maria f. Debes. Tey áttu fimm børn. Eitt av hesum var Debes, sum seinni tók við handlinum, sum Poul Sivertsen hevði byrjað nøkur ár nøkur framman undan.

Men serliga synirnir Sámal og Kristian blivu kendir sum skiparar og reiðarar. Teir keyptu í 1897 saman við pápanum sluppina Jubilæ, sum var fyrsta skip, sum kom til Norðdepil. Í 1903 keypa teir King Arthur. Jubilæ fer á land og verður vrak í 1909. Stutt eftir keypa teir Ternuna, sum Sámal førdu fram til 1927, og síðan keyptu teir Grundick. Sámal og Kristian vóru skiparar hvør síni 37 ár.

Teirra reiðarí var eitt av teimum best umtóktu í landinum, og úrslitið var eisini, at menn trivust við og vóru í mong ár við skipum teirra. Sámal giftist við Katrinu Mariu f. Sørensen úr Havn. Hann fluttti eisini til Havnar á yngri árum.

Tey fingu børnini Jonu, Erling og Hans Leon og Louis. Tað var sonur hansara við sama navni, sum vit hittu hendan dagin.

## Søgan hjá Louis

Tað fyrsta vit gera er at fáa søguna hjá pápanum, Louis. Hann er føddur í 1915. Sum ungur fer hann í smiðjulæru, men í 1938 noyðist hann at fara til Danmarkar at taka prógv. Tá ið hann hevði fingið síni pappír, fer hann út sigla. Hann hevur sum nógvir føroyingar havt hug til at royna nakað annað enn fiskiskap, sum stórt sæð var einasti møguleiki í Føroyum tá. Hann sigldi fyrst tvey ár sun motorpassari við einum donskum farmaskipi. Í Liverpool mynstrar hann síðan við einum køliskipi, og tá kom hann at sigla við bananir millum Panama og San Fransisco í USA fyri stórfyritøkuna United Fruit.

Men so hendir tað, at Danmark verður hersett av í 1940 og kemur óbeinleiðis undir týskt ræði. Tá skifta teir til Honduras flagg og halda fram í somu sigling.

Men í 1941 kemur USA uppí seinna heimsbardaga, tá ið Japan loypur á Pearl Harbour, stóru flotastøðina hjá USA á Hawaii. Tá verður skipið tikið av amerikanskum myndugleikum, og fara teir at sigla tvørtur um Atlantshav. Men nú er tað ikki longur við bananum, men við bumbum, sum teir føra til teir sameindu í okkara parti av heiminum. Eftir øllum at døma hevur tað minkað um spreingivandan, at bumburnar kundu flytast við einum køliskipi. Í hesi sigling vóru teir restina av krígnum. Ein partur av hesi søgu er eisini, at donsku sjómenninir mistu sambandið til síni heima í Danmark. Nógvir av teimum umkomust eisini í hesi sigling.

Vanligt var at sigla i konvoy, tað vil siga, at nógv skip fylgdust og høvdu herskip at verju seg. Men hetta gjørdu teir ikki. Teir sigldu einsamallir. Hetta var kanska tryggara, tí tað var kanska minni spennandi hjá kavbátum at leggja eftir einum einstakum skipi enn eftir einum skipafylgi, har nógv skip kundu fáast fyri í senn. Men høvdu týskarar kent lastina, hevði tað nokk verið øðrvísi!

Hetta skip sigldi eisini so mikið skjótt, 15 míl, at tað kundi sigla undan kavbátum, sum vóru í dýpinum. Men sigldu kavbátarnir í vatnskorpuni, sigldu teir skjótari, og tá var verri. Teir vóru einaferð jagstraðir av einum kavbáti, sum ikki var kavaður. Men teir høvdu kanónverju, og teir høvdu eisini manning umborð til at nýta kanónina. Tí tordi kavbáturin heldur ikki at koma ov nær, og eftir at hava verið jagstraðir av kavbáti í tríggjar dagar gav hann upp.

Í 1944 hitti Louis konu síða Rose einaferð, teir lógu inni í New York. Hon var av italienskari ætt, men var komin til USA sum fýra ára gomul. Tey giftast í 1945, og árið eftir verður sonurin Louis føddur.

Louis heldur áfram at sigla til 1948, tá ið hann legst uppá land. Fyrst arbeiðir hann á einum sláturvirki við at fáa fitina frá slaktaði kroppunum til sættis. Seinni fer hann at arbeiða sum maskinmeistari hjá renovatiónini hjá New York. Tað er óneyðugt at siga, at her var nóg mikið at gera við skrellinum hjá einum av heimsins størstu býum! Hetta arbeiðið hevði hann, til hann leggur frá sær 66 ára gamal. Hann doyr í 1998, 83 ára gamal. Kona hansara doyði í 1991.



*Katrina og Sámal í Hvannasundi saman við sínum børnum. F.v.: Hans Leon, Erling, Louis, Katrina, Sámal og Jona*

Umframt Louis er ein beiggi, sum eitur Ronald. Hann er 10 ár yngri og er føddur í 1956.

Louis vitjaði ofta aftur í Føroyum. Hann kom fyrstu ferð í 1952, og tá mundu ganga 4-5 ár millum hvørja ferð hann kom.

## Louis gjørdist løgregluyvirmaður

Louis, sum kallar seg Lou, býr einar 50 km norðanfyri Manhattan, so tað er bert ein løta eftir amerikanskum viðurskiftum at koma inn í býin.

Hann var sum ungur fyrst í herinum, og aftaná kom hann at arbeiða í 20 ár sum løgregluyvirmaður í New York. Hetta starv legði hann frá sær í 1988, og tá kom hann at arbeiða hjá eini stórari fyritøku innan byggivinnuna. Aftaná 11. september 2001 kom steðgur í nógv virksemi í USA og eisini í byggivinnuni. Tá byrjaði Louis at arbeiða fyri seg sjálvan við smærri húsaumvælingum av ymiskum slagi. Hann hevur havt upp til seks mans í arbeiði. Nú eru teir tveir. Við eini slikari fyritøku ræður hann sær sjálvum og við so fáum monnum er tað heldur ikki so bundið.

Louis er giftur við Carol, sum kemur frá Queens, sum er ein býarpartur í New York. Tey eiga ein son Erik Joen Hammershaimb Christiansen, sum 23 ára gamal. Tey eiga eisini eina dóttir Karina Maren, sum er 21 ár.

Børnini hjá Sámali í Hvannasundi eru farin nokk so víða. Louis fór til Amerika og Hans Leon fór til Danmarkar, og ein sonur hansara